# ET EFTERSKOLEOPHOLD I DANMARK?

HORNE UNGDOMSSKOLE TILBYDER:
9. KL. - 10. kl. - 11. kl.

FÅ FORBEDRET DINE DANSKKUNDSKABER

MULIGHED FOR KONTAKT MED FÆRINGER I LOKALOMRÅDET

VENNER FOR LIVET

KONTAKT OS FOR YDERLIGERE INFORMATION

TLF.: 00 45 98 94 93 22
E-MAIL: info@horne.dk
HJEMMESIDE: www.horne.dk

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Barnaansingin**
Barnaansingin í Tórshavnar kommunu umfatar dagrøktarskipanina, 29 dagstovnar og 10 frítíðarskúlar við tilsamans 1.700 børnum í ansing.

**Dagstovnurin við Botnánna**
er gamli frítíðarskúlin ið er útbygdur soleiðis, at børn eisini ganga í barnagarði har. Í barnagarðinum ganga 20 børn og í frítíðarskúlanum ganga 25 børn.

**Dagstovnurin Lítliskógur**
Á Lítlaskógi ganga 94 børn. Stovnurin er skipaður við tveimum vøggustovum og fýra barnagarðsstovum, harav tann eina er skipað við 6 ára gomlum børnum.

www.torshavn.fo

## Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Dagstovnin við Botnánna**
eftir einum pedagogi og einum hjálparfólki at starvast 30-35 tímar um vikuna, at byrja 1. apríl 2004.

Leiðari: Malan Jógvansdóttir, tlf. 421353 fartl. 225323
Botnávegur
410 Kollafjørður
frikoll@torshavn.fo

**Dagstovnin Lítliskógur**
eftir einum pedagogi ella hjálparfólki at starvast 30-35 tímar um vikuna, at byrja 1. mars 2004

Leiðari: Frígerð Sundskarð, tlf. 319131 og 319132
Djóna í Geils gøta 41
100 Tórshavn
frigerd@torshavn.fo

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til stovnsleiðaran ella til Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi mánadagin 1. mars 2004.

## Starvslønir
### til listaligt og mentanarligt arbeiði

Mentanargrunnur Landsins letur umsøkjarum starvslønir við støði í listaligum og fakligum metingum av verkevni ella verkætlan.

Endamál grunsins er at styðja starv fyri føroyskum máli, bókmentum, list, vísindum og øðrum mentanarmálum bæði hjá leikum og lærdum. Grunnurin skal serliga stuðla tiltøkum og verkætlanum, sum kveikja og menna føroyska myndlist, tónlist, bókmentir, sjónleik og aðra list, sum kann javnmetast við hesar listagreinir.

Starvslønirnar kunnu verða latnar soleiðis:
1 starvsløn galdandi í 3 ár og starvslønir galdandi í 1 mánað til 12 mánaðir.

Upphæddin á starvslønini svarar til læraralønina á fólkaskúlans lønarstigi 21, stigi 1, sum eftir 1. mars 2003 er kr. 20.073,58 um mánaðin.

**Umsóknir skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 19. februar 2004**

**Umsóknarbløð fáast á heimasíðuni ella á skrivstovuni.**
**Mentanargrunnur Landsins** - Tórgarðsgøtu 42 - FO-100 Tórshavn Tlf. 32 08 42 - fartlf. 21 80 13 - fax 31 19 98
mentan@mentanargrunnur.fo - **www.mentanargrunnur.fo**

VØGGUSTOVAN OG BARNAGARÐURIN Á KONMANSMÝRU

## Pedagogar

Vøggustovan á Konmansmýru søkir eftir tveimum pedagogum.
Eitt starv er 30 tímar um vikuna frá 15. mars 2004 og eitt er 30 tímar um vikuna frá 1. mai 2004

Í vøggustovuni eru 3 stovur við 12 børnum á hvørjari.

Vit bjóða tvey áhugaverd størv, har umsøkjarin fær møguleika til at gera sína ávirkan á stovnin.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- hevur góð samstarvsevni.
- ikki er bangin fyri at taka ábyrgd.
- er røkin, nærlagdur og álítandi.
- er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið.
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroytan og tryggan dag við virðing fyri einstaka barninum.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita við at venda sær til leiðaran Katrin Bjarnadóttir á telefon 313131.

Umsókn við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera okkum í hendi seinast 01.mars 2004.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

## Bilar við skaða til sølu

Tryggingarfelagið Føroyar hevur bilar við skaða til sølu á heimasíðuni

**www.trygging.fo**

## Íbúð til sølu

Ljós 3 verilsis íbúð, umleið 75 m² á Østerbro í Keypmannahavn til sølu.

Søluprísur 1.6 mill. kr.

**Ring +45 3053 8999**
**ella +45 4040 4637**



## m/b Glyvursnes



árg. 1997, verður hervið lýstur til sølu um hóskandi boð fæst.

**Heima 310455/316727**
**Mobil 267796/224828**

## Grindabátar

Í **»kunngerð um grind«** frá 8. apríl 1998 er ásett í § 3, stk. 3, at: Bátur, sum fer í grind, skal verða merktur við **havnakenningartekini**.

Nevnda »havnakenningatekin« er ein fyritreyt fyri at fara í grind við báti, og fyri at verða við í einum grindaskifti.

»Havnakenningartekin« fæst ókeypis við at venda sær til Skráseting Føroya (Skipaskrásetingina), Yviri við Strond 19, Postboks 3068, 110 Tórshavn ella Sýslukrivstovuna í Vestmanna, Postboks 93, 350 Vestmanna.

Streymoyar Sýsla, hin 5. februar 2004

**Ivan Klein Olsen,**
sýslumaður

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

## Avloysari fyri granskingarhjálpara

Søkt verður eftir einum granskingarhjálpara til Føroyamálsdeildina í umleið 1/2 ár at arbeiða 3/4 tíð fyri starvsfólk í barsilsfarloyvi.

Uppgávan hjá granskingarhjálparunum er at vera hjálparfólk hjá granskarunum á deildini, haruppií at røkta søvn á deildini og annað fyrifallandi. Høvuðsuppgávan hjá avloysaranum verður at skráseta orðaseðlasavn í telduforrit.

**Førleikakrøv:**
Exam.art.-prógv í Norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum.
Góður teldukunnleiki.
Góð samstarvs- og tillagingarevni.

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarflokki V.

Starvið verður sett frá 1. mars ella eftir avtalu.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Turið Sigurðardóttur, deildarleiðara, turids@setur.fo

Umsóknarfreist er 16. februar 2004. Umsóknir við avritum av próvskjølum, viðmælum o.ø. skulu sendast:

**Føroyamálsdeildini**
**Fróðskaparsetur Føroya**
V. U. Hammershaimbs gøtu 16
Postrúm 272 · 110 Tórshavn
tlf. 352520

VØGGUSTOVAN OG BARNAGARÐURIN Á KONMANSMÝRU

## Leiðari til Vøggustovu

Søkt verður eftir avloysara fyri leiðara í barnsburðarfarloyvi 30 tímar um vikuna frá 1. apríl 2004 til 31. august 2005.
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, lønt eftir lønarstig 22 til 28.

Leiðarin hevur fakligu, fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina av stovninum. Tað verður væntað av umsøkjaranum, at hann á ein leiðandi og virknan hátt, saman við starvsfólkunum, kann tryggja stovninum eina positiva menning. Tað er týdningarmikið, at umsøkjarin hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir, hevur evni og vilja at samstarva á øllum økjum, er sjónligur í sínum leiðarastarvi og dugir at fáa síni sjónarmið fram.

Bert umsøkjarar, sum hava lokið námsfrøðiligt prógv ella líknandi prógv, kunnu søkja starvið.

Tað kann upplýsast, at eftir ætlan verður skrivstovufólk sett í starv, at taka sær av bókhald v.m.

Nærri fæst at vita um starvið frá Hannebeth Dam ella Katrin Bjarnadóttir á tlf. 31 31 31.

Umsókn við prógvum, viðmælum v.m. skulu verða stovninum í hendi innan **1. mars 2004.**

Umsóknir verða at senda til:

**Vøggustovuna á Konmansmýru**
Att: Nevndin
Hoyvíksvegur 41 B
100 Tórshavn

*Vøggustovan og Barnagarðurin á Konmansmýru eru sjálveigandi stovnur við heimstað í Tórshavn. Endamáli stovnsins er barnaansan um dagin. Í vøggustovuni eru 3 stovur, 35 børn og 12 starvsfólk.*

## E | ROKNSKAPUR

Bókhald • Fíggjarætlan • Roknskapur
Skattur og sjálvuppgáva • Fyrisiting v.m.

**E|Roknskapur Sp/f**
**Dvørgastígur 9 • 100 Tórshavn**
**Tel: 322 570 • Fax: 322 572 • Far: 212 570**
**info@e-roknskapur.fo**
**www.e-roknskapur.fo**

## Felagið Agape

hevur skeið 20. - 21. februar
í Meinigheitshúsinum í Havn

**Evnið: Sorg og kreppa**

**Undirvísarar: Connie og Mads Noer,** psykoterapeutar og familjurráðgevarar við drúgvum royndum innan undirvísing, samtalu og ráðgeving.

**Undirvísingin** byrjar fríggjakv. kl. 19.30.

**Kostnaður** 450 kr.

Nærri fæst at vita og fráboðan um luttøku hjá Viggo Johannesen, tlf. 321175 ella Sólbjørg Símunarson, tlf. 310899

**Hjartaliga vælkomin.**

## GSM telefonir

Nokia - Siemens - Motorola
Ericsson - Panasonic

**Tráðleysar**

Siemens Dect.
Kunnu ikki avlurtast

**Til skip og bátar**

NMT 450 - VHF telefonir v.m.

**Storno** SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045

## Arbeiðshandskar

*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

Sosialurin 311820

Bilar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur
Nøvn

www.sosialurin.fo